# TAÐ ALMENNA VANVIR

**Petø venjingar er heitið á venjingartilboði til fjølbrekað børn. Hetta er eitt sera týdningarmikið tilboð til børnini, sum foreldur og avvarandi eru sera glað fyri. Men samstundis, sum hetta fantastiska skeiðið verður boðið fram, verður møguleikin at luttaka frátikin børnunum**

Leo Poulsen
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hvør er meiningin hjá tí almenna við aðrari hondini at bjóða fram framúrskarandi tilboð, samstundis sum tað við hinari hondini verður forðað fólki í at luttaka?

Tað spyrja foreldur at fjølbrekaðum børnum seg sjálvi og Stuðulsfólkaskipanina fyri børn.

Í farnu viku byrjaði eitt tríggjar vikur sonevnt Petøskeið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri børn við serligum tørvi. Foreldur og avvarandi eru øll samd um, at hetta skeið hevur ómetaliga stóran týdning fyri børnini, men tey siga eisini, at í stóra samanhanginum er skeiðið ikki meiri enn hálvt, tá stuðlarnir hjá børnunum ikki sleppa við á skeiðini.

Sosialurin hevu tosað við trý av foreldrunum at hesum børnunum, og tey eru øll ómetaliga hørm um, at stuðlarnir hjá børnunum ikki sleppa við.

- Stuðlarnir hava jú børnini teir fimm gerandisdagarnir í vikuni, men tá teir ikki sleppa við at læra, hvussu teir kunnu venja børnini til gerandis, ber so illa til kontinuerliga at stimbra og menna børnini. Tá verður tað bert til tað, ið foreldrini kunnu gera um vikuskiftini, eru tær tríggjar, Alis Joensen, Sólvá Johannesen og Eydna Skaale, samdar um. Harumframt krevja fleiri av børnunum fleiri enn tvær hendur at hjálpa sær, og tí er neyðugt at hava stuðul við.

Tað skal tó undirstrikast at tað eru ikki stuðlarnir, ið eru trupulleikin, tí teir vilja fegnir við, men haraftur ímóti skipanin, ið svíkur.

Seinastu tvey árini hava hesar Petø-venjingar verið í Føroyum sum ein royndarverkætlan.

Framman undan fingu foreldur at fjølbrekaðum børnum tilboð um at sleppa til hesar venjingar við stuðli, og tá fóru venjingarnar fram uttanlands. Hesar vóru bæði í Skotlandi og í Svøríki, og tá var einki óført hvat tí fíggjarliga viðvíkti.

- Men nú ein skipan er komin í lag, har ein persónur kemur til Føroya at skipa fyri Petø-venjingunum, er alt hopleyst á fíggjarliga økinum, sigur Eydna Skaale.

### Tvørligt

Tað sigur seg sjálvt, at tað gerast tungir og strævnir dagar hjá foreldrum at ferðast langan veg við børnunum og síðani at gjøgnumganga eitt tíggjar tímar skeið.

- Hvussu eg so afturvísti teimum frágreiðingum, sum Stuðulsfólkaskipanin kom við, so var einki at gera. Um mamma mín ikki traðkaði til og kom við til venjingarnar, so fekk Benjamin ikki sína venjing. Stuðlarnir eru til arbeiðis og fáa sína løn, men teir sleppa ikki til Klaksvíkar at gera sítt arbeiði, tí tað er ov dýrt. Tað hongur ikki saman. Og tað ber ikki til, at venjingin skal vera treytað av goodwill frá ommum og øðrum góðum fólki, sigur Eydna Skaale.

Hon heldur tað vera løgið, at Stuðulsfólkaskipanin ikki er ekstatisk yvir møguleikan at útbúgva og førleikamenna sínar stuðlar við Petø skeiðnum.

- Venjingin er so sera góð fyri sonin, og hann ger sera stór menningarlop, hvørjaferð hann hevur verið til Petøvenjing, sigur Eydna Skaale.

Trupulleikin er tó eisini tann, at so nógvir ymiskir instansir eru vavdir inn í málið. Har er Stuðulsfólkaskipanin, Almannastovan, kommunurnar... You name it. Og hetta er eisini nakað, ið fysioterapeutarnir, ið eru knýttir at skipanini, kenna til. Tí tað er nevniliga ikki líkamikið, hvørjari kommunu tú býr í.

Einki er tó at taka seg aftur í, at tað er tvørligt hjá nógvum at koma til Klaksvíkar til hesar alneyðugu venjingarnar. Og onkur kemur allan tann langa veg úr Sandoynni og Suðuroynni við børnum, so tey skulu kunna fáa eitt so frægt lív, sum til ber.

### Bara tilboðið er útlendskt

Sólvá Johannesen eigur Ronnie, sum er knýttur at koyristóli. Heldur ikki hon skilir, at tað nú skal vera ógjørligt at fáa stuðul við til Petø-venjingarnar.

- Fyrr, tá venjingarnar vóru uttanlands, sluppu foreldur og stuðlar við, og ofta var tað so, at ein stuðul var við í 14 dagar, so fór hann heim, meðan ein nýggjur tók yvir. Tí er tað óskiljandi, at einki ber til nú, tá bert ein persónur skal koma til Føroya, sigur Sólvá Johannesen.

Hon fegnaðist stórliga at fáa venjingina til Føroya, eisini tí tað er leingi at vera burtur frá familju í ein mánað, tá venjingin fór fram uttanlands.

- Tað var jú eisini nakað, sum var dýrt fyri landið, so at fáa venjingina hendan vegin var eitt stórt framstig, ikki minst fyri okkum foreldur, sigur Sólvá Johannesen.

Skeiðið kostar í dag ein brotpart av tí, tað kostaði, tá familjurnar vórðu sendar av landinum, men kortini hevur landið minni ráð í dag at rinda tær fáu túsund krónurnar, tað kostar í bensini, sum teir gleðiliga rindaðu milliónir, tá skeiðini vóru uttanlands.

- At spara nú, kann koma at kosta dýrt í seinna enda, sigur Sólvá Johannesen.

Hon dugir eisini væl at síggja á soninum, at hann gleðir seg at sleppa til Petøvenjingarnar.

- Hann strálar, tá hann fær at vita, at vit skulu til Petøvenjing. Og tær geva eisini veruliga nógv, og tí hevði tað verið sera gott, um ein stuðul kom við, sum eisini kundi gjørt hesar venjingarnar við Ronnie gjøgnum vikuna, so tað ikki bara var um vikuskiftið, at tær verða hildnar viðlíka, sigur Sólvá Johannesen.

*leo@sosialurin.fo*

# Søplaðu umsóknina burtur


**Viðv. umsókn um stuðul við til Petø-venjingar 6.-24. september 2010**

Tygum ringdu til Stuðulsfólkaskipanin fyri børn 27. august 2010 við umbøn um stuðul við til Petø-venjingar í Klaksvík í tíðarskeiðinum 6. -24. september 2010, til dóttir tygara, Sunnrið Joensen, fødd 13. august 1998. Tygum vóru vegleidd at venda tygum til Almannastovuna við umsókinini.

Vegna stuttu freistina, hevur SFB tó viðgjørt væntaðu umsóknina sambært § 32c í Forsorgarlógini.

Avgjørt er ikki at ganga umsóknini á møti. Avgerðin er grundað á at fíggjarviðurskiftini í SFB loyva ikki hesum.

Sagt skal verða frá, at avgerðin kann kærast til Føroya Kærustovnur, Undir Hornabakka, Postsmoga 45, 110 Tórshavn, innan 4 vikur frá móttøku av hesum skrivi.

Vinarliga
Súsanna Holm
Súsanna Holm, leiðari

**Alis og Hans Petur Joensen hava tvey børn, ið hava serligan tørv. Tey fingu at vita, at tey fingu ikki stuðul til bæði børnini, og gingu so út frá, at tey í hvussu er fingu til annað. Men nei**

Leo Poulsen

At tað er tungt at fáast við almennar stovnar munnu flestu føroyingar skunna skriva undir upp á. Men at tað skal vera so tvørligt, sum hjá Alis og Hans Petur Joensen av Oyrareingjum, munnu tey fægstu vita.

– Tá vit tosaðu við Stuðulsfólkaskipanina fyri børn fingu vit greitt at vita, at vit fingu ikki stuðul til bæði børnini. Og tá tú fært slík boð so gongur tú automatiskt út frá, at so fært tú í hvussu er stuðul til annað barnið, sigur Alis Joensen.

Hon og maðurin hava tvey børn ið hava serligan tørv fyri neyðuni, 5 ára gamla Frits og 12 ára gomlu Sunnrið. Frits hevur sýnt stóra framgongd, millum annað umvegis Petø-venjingarnar, og er nú á serligum stovni í Hoyvík, meðan Sunnrið framvegis má hava egnan stuðul.

Hennara stuðul er knýttur at Stuðulsskipanini fyri børn, eins og allir aðrir stuðlar, og tey hava eini hølir á skúlanum á Trøðni, so øll børnini eru saman. Stuðlarnir eru á skúlanum á Trøðni allan dagin, og eru løntir samsvarandi.

– Av tí at Frits var betri fyri, og tí hann var til Petø-skeiðið í apríl, valdu vit at søkja um stuðul til Sunnrið til hetta skeiðið í september, sigur Alis Joensen.

Umsóknin varð latin inn longu í mars mánað, men tá august var um at enda og einki svar kom, setti hon seg í samband við Stuðulsfólkaskipanina at frætta nærri.

Har fekk hon bara at vita, at eingin umsókn var komin. Men hetta var jú ikki rætt, og tað kundi Almannastovan eisini vátta. Umsóknin var komin í mars.

Kortini skrivar Stuðulsfólkaskipanin í svari sínum til Alis Joensen 1. september:

### »Vegna stuttu freistina...«

Stuðulsfólkaskipanin gevur sostatt Alis Joensen skuldina fyri, at Stuðulsfólkaskipanin sjálv hevur søplað umsóknina burtur.

– Vit fingu onga frágreiðing annað enn, at fíggjarlig orka var ikki til staðar at lata stuðulin fylgja við Sunnrið til Petø-venjingarnar í Klaksvík, sigur Alis Joensen.

Hon og maðurin máttu tí sum frægast royna at taka sær frí fyri at dótturin kundi fáa alneyðugu venjingarnar.

– Tað gongur, tí vit hava so lagaligar stjórar, sum skilja okkara støðu, men eg eri vís í, at tað ikki hevði gingið allastaðni, sigur Alis Joensen.

*leo@sosialurin.fo*



*Hans Petur og Alis Joensen saman við dóttrini Sunnrið. Hóast tørvur er á tí, fær hon ongan stuðul við til Petøvenjingarnar í Klaksvík*